Kappingareftirlitið

Advokatskrivstovan
Frúutrøð 4 - Postboks 6
110 Tórshavn

Att: Christian F. Andreasen, advokatur

Tórshavn, tann 17. desember 2025

**Viðv.: 25/00583: Sp/f 20.10.2025 fær felagsræði á Sp/f 31.01.2011, ið rekur línuskipið Sandshavið**
Kappingareftirlitið hevur, tann 17. desember 2025, móttikið eina einfalda fráboðan um eina yvirtøku hjá Sp/f 20.10.2025 av 20% av partapeninginum í Sp/f 31.01.2011. Eftir §17, stk. 5 í kappingarlógini byrjar freistin í §18, stk. 1, tá Kappingareftirlitið hevur móttikið fullfíggja fráboðan og skjalprógv fyri rindaðum ómaksgjaldi. Freistin byrjaði tann 2. desember 2025 .

P/f Vørðustíggjur, ið eigur trolaran *MS Eysturbúgvan* og rekur fiskivinnu, hevur gjørt av at gevast við virksemi sínum. MS Eysturbúgvin hevur fiskiloyvi til makrel, sild, gullaks og fiskidagar til botntrol á innaru fiskidagaleið.

Í hesum sambandi hava føroysku eigararnir í Sp/f Ango stovnað felag, ið skal keypa partabrøvini sum P/f Vørustíggjur eigur í Sp/f 31.01.2011. Føroysku eigararnir stovnaðu felagið, tí Vørn ikki vildi góðtaka Sp/f Ango sum keypara, orsaka av at útlendskur eigari var í Sp/f Ango.

Sp/f 31.01.2011 er felag sum eigur og rekur líniskipið *MS Sandshavið*. Sp/f 31.01.2011 hevur fiskidagar í bólki 3 – línuskip yvir 110 tons, botnfiskakvotu við línu í íslendsku sjógvi, djúphavsfiskakvotu í altjóða sjógvi, makrelkvotu í bólki 3, toskakvotu á Flemish Cap og toska og brosmukvotu í Eysturgrønlandi. Higartil í ár hevur Sp/f 31.01.2011 avreitt 1.255 tons við einum avreiðingarvirði á 48,26 mió. kr.

Talan er um eina transaktión sum kemur undir samanleggingarhugtakið í §13, stk. 1 kappingarlógini, og umsetningurin hjá luttakandi fyritøkunum er omanfyri markvirðini í §14, stk. 1, nr. 1 í kappingarlógini.

Fráboðað er eftir einfaldum leisti, tí transaktiónin kemur undir §3, stk. 1, nr. 7 í reglugerð nr. 2 frá 3. januar 2025 um samanleggingar. Talan er um støður har luttakandi fyritøkur reka virksemi, sum krevur loyvi sambært kapittul 2 í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 155 frá desember 2023.

Grundað á fyriliggjandi upplýsingar hevur Kappingareftirlitið tikið avgerð um, at góðkenna yvirtøkuna eftir einfalda málsviðgerð, sbrt. §15, stk. 7 í kappingarlógini, vísandi til §15, stk 2 í kappingarlógini um, at ein yvirtøka, sum ikki munandi forðar fyri virknari kapping skal góðkennast.

Kappingareftirlitið

Vísast skal á, at talan er um partar, seljari og keypari, sum hvør sær stóðu fyri minni enn 2 % av samlaðu avreiðingunum í 2024.

Góðkenningin er treytað av at upplýsingarnar, sum fráboðari hevur latið Kappingareftirlitinum, eru rættar, sbrt. §20 í kappingarlógini.

Vegna
Kappingareftirlitið

Terje Sigurðsson
Deildarstjóri

Sigurd Rasmussen
Fulltrúi